## Føroyskt øl til flottan ølbúk

Danska Ekstra-Blaðið vil nú finna flottasta ølbúkin í Danmark. Átakið hjá Ekstra-Blaðnum verður gjørt, nú altjóða heilsuvika er fyri mannfólk. Snøgt sagt, so heldur blaðið, at tað er nakað tvætl, at menn skulu eta minni kjøt, drekka minni øl, røra seg meira og viga minni. Í myndakapping verður tí roynt at finna vakrasta ølbúkin í ríkinum, og vinningurin er frá Føroya Bjór. Haðani lata tey nevnliga ein eftirgjørdan ølbúk, sum er fyltur við øl. Til ber at tekna seg til kappingina umvegis heimasíðuna, www.eb.dk



## Danir raskir lýsarar

Ein nýggj kanning, sum Interactive Advertising Bureau hevur gjørt, vísir, at danir nýta í meðal 427 kr. árliga í lýsingum fyri hvønn brúkara á alnetinum. Hetta visti vinnuvitan.fo at siga týsdagin. Hetta úrslitið ger, at Danmark liggur heilt í oddinum, hvat viðvíkur lýsingum á alnetinum. Á ovastu rók liggur Ongland við 618 kr. fyri hvønn alnetbrúkara, meðan amerikumenn nýta 455 kr. fyri hvønn alnetbrúkara. Háost danir liggja so ovarlaga á listanum, so heldur FDIM, sum er felagið fyri alnetmiðlar í Danmark, at menningin innan lýsingar á alnetinum er sera positiv í Danmark.

# r dement og einsamøll



*Um eg tordi, hevði eg stillað meg mitt á Tinghúsvøllin og skríggja, sigur Erla Maria Simonsen um hjálparloysi í samband við at hava eina dementa mammu, sum ikki fær nøktandi hjálp*

tíðir skornan á háls ella skornan í túsund pettir.

- Og fyri henni er hetta hvørja ferð ein ræðuligur veruleiki. Hon krógvar seg eisini undir dýnuni, tí hon sær risastórar hundar og eiturkoppar í húsunum.

Mamman hevur í meir enn eitt ár staðið á akutta listanum hjá Tórshavnar Kommunu. Men dóttirin hevur mist vónina um at fáa nakra hjálp. Sjálvt um listin kallast akuttur, veit hon ikki, um hon fær pláss um mánaðir ella ár.

### Vanrøkt og vanvirðing

Erla Maria Simonsen sigur erliga, at um mannarættardómstólurin í Haag sá, hvussu mamma hennara livdi, hevði hon sum dóttir verið blakað í gegli.

- Mammusa lív er ikki eitt lív. Men hon vil ikki hjálpast. Hon er aktiv og viljasterk, og hon er nokk mest ómøgulig ímóti okkum nærmastu. Vit klára ikki at hjálpa henni. Og hjá tí almenna møta vit bara læstar dyr.

Fyri einum mánað síðan sendi kommunulæknin hana á statshospitalið, tí hann metti tað vera tað einasta rætta. Men hon varð avvíst, tí hon var "bara" dement.

- Hon fekk døgurða og var so send heimaftur. Kommunulæknin royndi, men hann hevur ikki endaligu avgerðina.

Dóttirin er sera hørm um ta viðferð, mamma hennara fekk á sjúkrahúsinum.

- Feskur fiskur hevði verið betri viðfarin enn hon, tí tey skuldu nokk syrgt fyri, at hann ikki rotnaði.

Í nøkur ár hevur mamma Erlu Mariu Simonsen havt heimahjálp, og dóttirin sigur, at heimahjálpirnar eru fittar og hugnaligar at snakka við, men tað er tíverri ikki nokk.

- Nærverkið hevur sagt, at um vit sleppa 100 prosent, so lofta tey 100 prosent. Men eg dugi ikki at síggja, hvussu hetta letur seg gera. Í dag koma heimahjálpirnar við døgurða og tablettum, og aðru hvørja viku gera tær reint.

- Mamma er mest aktiv um náttina, og tá er hon púra einsamøll. Vit orka ikki at vera hjá henni, og Nærverkið bjóðar onga náttarhjálp. Eg havi ræðuliga ringa samvitsku, men eg veit ikki, hvat eg skal gera. Mamma er so tung, at hóast vit vóru frískar, høvdu vit neyvan megna uppgávuna, sigur Erla Maria Simonsen.

- Eg havi ringt til ellisheim kring allar Føroyar, men har er ongin vón. Kommunulæknin hevur roynt at hjálpt okkum, tað nyttaði heldur onki. Tað kennist, sum øll ljós eru sløkt. Ongin fær hjálpt mammu, sigur hon syrgin

### Neyðarróp

Mamma Erlu Mariu Simonsen er sum sagt dement. Hon tosar um at sleppa heim, hóast hon er inni hjá sær sjálvari. Hon biður dóttrina hjálpa sær yvir um vegin mitt inni í stovuni, og hon hevur eina ósjónliga kettu. Um náttina hevur hon óteljandi deyð fólk á vitjan.

- Í smá sekund er hon klár, og tá sigur hon viðhvørt: Eg veit, at eg eri heima, og eg veit, at eg eri ikki heima. Og tað er ræðuligt at hava tað so.

Erla Maria Simonsen sigur, at, um hon tordi, hevði hon stilla seg mitt á Tinghúsvøllin og skríggja, so kroysta kennir hon seg.

- Hetta er mítt neyðarróp. Tað er fullkomiliga ábyrgdarleyst, at mamma livur, sum hon ger. Hon situr sum fangi í egnum húsi. Og hennara lív er ikki virðiligari enn tað hjá fangum í konsentratiónslegum, sigur desperata dóttirin um mammu sína, sum fyrr var ein glað, kreativ kvinna, sum arbeiddi á telefonverki, spældi bridge saman við vinum og seymaði lekkur klæði til sín og onnur.

- Mamma var eitt lívsstykki, ongin gjørdi mat sum hon, og ongin dugdi so væl at pynta seg sum hon. Hon hevði eitt gott lív.

Í dag situr gamla konan einsamøll í húsum sínum í Havn. Meðan fólk tuska til arbeiðis ella til fyrilestrar um vøkur Eden ellisár, situr hon í stovu sínari við eini ósjónligari kettu, yvirvaksnum eiturkoppum og deyðum vinum. Hon sær son sín verða dripnan og vónar, at onkur skal koma og leiða hana heim.